

Tónleikur

# Ein punknevi av harðasta



*- Vit hava vitað í nógv ár, at vit skulu geva eina livefløgu út, sum skal eita »200 Decibel«. Nú verður tað so, sigur Niels Arge Galán, forsangari í 200.*

**200 gevur fyrst í apríl frá sær livefløgu, »200 Decibel«, ið varð upptikin, tá bólkurin spældi á Roskilde 2006. - Ein rokkbólkur er ikki ein ordiligur rokkbólkur, fyrr enn hann hevur givið livefløgu út, sigur forsangarin í 200, Niels Arge Galán, í samrøðu við Sunnevu H. Eysturstein**

- Bíða, bíða. Eg skal líka mussa dótturina góðanátt, er tað fyrsta, ið Niels sigur ígjøgnum telefonina, tá eg ringi til hann.

Eg hevði væntað væl meira av roki og larmi í hinum endanum av rørinum. Hetta er jú landsins størsti punkrokkari. Tann við nógv mest eg-skíti-á-tað attitudu. Men kategoriseringar passa slett ikki altíð. Ein punkrokkari noyðist ikki at vera eitt ófantaligt neyt, fyri at vera punkrokkari. Tíbetur. Og tað er í grundini nógv kulari at bróta væntingarnar og ikki vera eitt neyt.

- Ok. Lat meg líka sleppa niður í kjallaran at festa mær í. So eigur tú mína uppmerksamheit, sigur hann aftaná eina løtu.

Eg bíði.

- Sáh, eh, skulu vit bara taka tað soleiðis, at tú spyrt og eg svari? sigur Niels, tá hann hevur fest sær í.

Jú, hví ikki tað. Tað var gamalt, í hvussu er, at gera uppá tann mátan. Og samrøðan byrjar nú av álvara.

*Ein fuglur sang mær í oyrað, at tit fara at geva nýggja fløgu út. Hvat er tað fyri ein?*

- Tað er ein konsertfløga. Ein live upptøka, givin út á fløgu. Vit hava vitað í nógv ár, at vit skulu geva eina livefløgu út, sum skal eita »200 Decibel«. Av tí sama hava vit tikið nógvar konsertir upp. Ella tað vil siga, at Jónas (Bloch, ið er ljóðmaður hjá 200, blaðkv.) hevur tikið upp fyri okkum.

- Vit høvdu stórar ætlanir um at seta okkum at lurta eftir øllum upptøkunum. At velja út, seta saman osfr. Men so funnu vit útav beint fyri jól, at konsertin, ið vit spældu á Roskilde 2006, var so pissifeit, at hon burdi bara verið givin út, øll sum hon var. Og tað er tað, sum hon fer at blíva nú. Útgivin, also.

*Hví gevur ein live upptøkur út? Og hví hava tit valt at gera tað?*

- Tí tað eiga ordiligir rokkbólkar at gera. Tað eru nøkur stunt, ið ein má pulla sum rokkbólkur. Tú mást t.d gera eitt »666« og eitt »Mamma« lag, tú mást geva út á vinyl, og tú mást geva livefløgu út, fyri at vera eitt ordiligt rokkorkestur. Vit hava klárað trý tey fyrstu stuntini, og nú manglar bara tað síðsta. Vit eru eisini einasti føroyski bólkurin, ið hevur givið livefløgu út, líka umframt Yggdrasil og Spælimenninar. Tað sigur eitt sindur um rokkfaktorin her í landinum.

Sarkasman skínir langan veg. Ikki ein ónd ein, men ein sjarmerandi, stuttlig, provokerandi ein. Tann, sum kemur fram, tá 200 eru á palli, og propaganda og grefligt kjaftaslit eru á breddanum.

- Vit vænta ikki at selja so nógv av fløguni, men tað er heldur ikki ætlanin at skula selja. Vit halda, at tað er kul at gera hesa fløguna. Um tað selur ella